ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

23. november 2021
Mál: 21/23263
Tygara Skriv:
Viðgjørt: BÁT

Nr. 52-080/2021

Svar uppá § 52a fyrispurning nr. 52-080/2021 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, um bíðilista til Megna títt lív

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

1. Hví eru 18 fólk á bíðilista til tænastuna Megna títt lív?
2. Hvussu nógv kostar tað at fáa hendan bíðilistan burtur?

Til nr. 1 og 2
Í sambandi við fyrispurning nr. 52-071/2021 frá Jóhannisi Joensen, løgtingsmanni, varð upplýst at 18 fólk stóðu á bíðilista til Megna títt lív (MTL). Her er talan um eina misskiljing, tí MTL hevur ikki bíðilista, sum vit kenna tað frá øðrum tænastum í Almannaverkinum, t.d. til bútilboð. Tá Almannaverkið hevur svarað, at 18 borgarar eru á bíðilista, tá skal tað ikki skiljast soleiðis, at talan er um borgarar, sum hava søkt og eru ávíst til tænastu í skipanini. Talan er hinvegin um 18 borgarar, ið Almannaverkið hevur samband við, og sum Almannaverkið metir høvdu havt gagn av tættari tilknýti til MTL.

MTL er ikki ein tænasta, sum borgarin søkir um. Heldur er talan um, at MTL vendir sær til teirra, sum mett verður hoyra til málbólkin. Tað eru 18 borgarar, sum MTL hevur fokus á, men sum ikki enn hava fast tilknýti til MTL. Hesir borgarar eru ikki á einum vanligum bíðilista og hava ikki regluligt samband við starvsfólkini í MTL. Í nøkrum førum er talan um borgarar, sum ikki ynskja hjálp frá MTL. Í øðrum førum eru tey í øðrum skipanum, men fáa nakað av hjálp og stuðli frá MTL til at megna at taka í móti hjálpini, sum aðrar skipanir kunnu veita. Talan kann t.d. vera um rúsviðgerð. Onnur sita í fongsli og hava tí ikki møguleika at fáa tænastu frá MTL, fyrr enn tey verða leyslatin. Skipanin MTL ger uppsøkjandi arbeiði, og tað kann vera sera ymiskt, í hvønn mun borgarar eru motiveraðir at vera partur av skipanini.

Av teimum 18 persónunum, sum nevnt omanfyri, eru 5, sum eru í ferð við at fáa eitt fast tilknýti til tænastuna.

MTL hevur í dag 10 borgarar í skipanini, sum hava fast tilknýti til starvsfólkini í MTL.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • E-mail: amr@amr.fo

Avbjóðingin er fyrst og fremst, at persónarnir ikki eru motiveraðir at fáa hjálp frá MTL ella øðrum skipanum, og harvið er trupulleikin í løtuni ikki manglandi játtan.

Tórshavn, 23. november 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður í almannamálum